Ove Vith

Uppi á loftinum

Leikarar:

Niels – ein drongur _____

Birita – ein genta _____

Mamman _____

Pápin _____

Jólamaðurin _____

1. vættur _____

2. vættur _____

3. vættur _____

4. vættur _____

5. vættur _____

6. vættur _____

7. vættur _____

8. vættur _____

Týtt hevur 7. B á Venjingarskúlanum 1986/87

Lærari: Paulivar Andreasen

Eitt sindur um sjónleika-venjing við børnum

Fyrst verður leikurin lisin upp í síni heild. Roynt verður at gera leikin so spennandi hjá børnunum sum gjørligt.

Síðani verður ein mynd vand í senn. Børnini kunnu spæla ein part nakrar ferðir við ongum handriti (improvisatión), har børnini skiftast at hava teir ymsu leiklutirnar. Um lærarin velur »skeivt« fyrstu ferð, kann tað verða trupult at skifta seinni og ikki særa okkurt av børnunum.

Tá ið børnini hava spælt leikin nakrar ferðir og hava *skilt gongdina* í leikinum, verða leiklutirnir ásettir og handrit býtt út. — Nú verður heitt á børnini um at læra seg leiklutin uttanat.

Nú er so at vóna, at børnini sjálv duga at síggja, at summi hóska best til ein leiklut, onnur til onkran annan.

Tað hevur eisini stóran týdning at fáa børnini at skilja, at allir leiklutir eru týdningarmiklir; tey, sum arbeiða aftanfyri á pallinum, har alt skal gerast stundisliga og stillisliga, hava eins stóran týdning og tey, sum standa á palli.

Tað er heldur ikki bara tey, sum siga okkurt beint nú — ella skulu siga nógv í leikinum — sum eru týdningarmikil. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann leggja nógv afturat leikinum, um hann spælir væl í røttu løtu. Ein, sum hevur ein lítlan leiklut, kann taka nógv frá leikinum, um hann dregur ov nógv eygu at sær, tá ið hann ikki skal.

Fyrstu ferð, ið vant verður rættiliga á palli, skulu børnini læra at arbeiða aftan fyri pallin og ikki larma. Tað loysir seg at brúka nógva tíð til at venja hetta.

Royn skjótast gjørligt at áseta, hvar leikarin skal ganga og standa, tá ið hann skal siga okkurt. Tá festa setningarnir seg betur, og leikararnir vera tryggari.

Ven børnini frá byrjan at venda sær ímóti áskoðarunum, tá ið tey tosa, og at tosa *nógv* harðari og týðiligari, enn tey halda seg skulu.

Hini børnini kunnu fara oman í salin at eygleiða og lurta, um tað hoyrist nóg væl.

Royn at fáa børnini *ikki* at skunda sær. Onkuntíð hevur tað, at steðga á, mest at siga.

1. partur

Pallurin er eitt loft. Vit hoyra tónleik úr stovuni. Tónleikurin hoyrist betur, tá ið lemmurin fer upp. Ein drongur stingur høvdið upp gjøgnum lemmin. Heilt kámt ljós.

Niels: Eg segði tað altíð... har eru ongar vættrar! *(Úr stovuni hoyrist ein lágmælt rødd)*

Birita: Hygg nú væl... kanska teir krógva seg onkustaðni. *(Niels krýpur upp gjøgnum lemmin og tendrar eina lummalykt).*

Niels: Nei... *(lýsir runt)* eg hugsaði tað altíð... Har eru ongar vættrar — als ongar. *(Ein genta kemur undan í lemminum)*

Birita: Hevur tú hugt allastaðni?

Niels: *(Ilsligur á málinum)* Eg tími ikki at fjantast her uppi á loftinum, tað er tað bera tvætl, tey vaksnu vilja hava okkum at trúgva! *(Birita krýpur heilt upp á loftið)*

Birita: Sum tað er kalt her uppi! *(Skultrar sær)*

Niels: Men her er jú eingin bjálving!

Birita: *(Hyggur rundan um seg)* Vættrar kunnu ikki vera her uppi í hesum kuldanum!

Niels: *(flennir og setur seg niður á eitt gamalt kuffert)* Hví ikki... tað verður sagt, at vættrarnar koma norðaneftir... ivaleyst úr Grønlandi.

Birita: *(gnisar)* Men Niels, hvør hevur sagt, at vættrarnar koma úr Grønlandi?

Niels: *(argur)* Tað hevur mamma sjálv sagt!

Birita: Ikki siga so... mamma sigur, at so koma ongar vættrar.

Niels: *(flennir)* Sovorðnum tvætli lurtar tú ikki eftir! Verða vættrarnar burtur, bara tí at mamma sigur tað?

Birita: *(spakuliga)* TAÐ sigur mamma!

Niels: *(flennir framvegis)* Og hvat hendir, um onkur prumpar her inni?

Birita: Niels!

Niels: Bjarni og eg vóru her uppi á loftinum, og tá prumpaði hann!

Birita: Tigur tú ikki, so tími eg ikki at vera her! *(Birita er komin longur niður í stigan og støðgar)*

Birita: Um teir koma, so verður tað ikki í dag.

Niels: Tað er jólaaftan í morgin. Koma teir ikki nú, so koma teir als ikki.

Birita: Eg haldi, hatta er bera tvætl... her koma als ongar vættrar!

Niels: Hatta sigur tú bara, tí tú ert firtin, títt grenj. *(Birita krýpur heilt niður í stigan)*

Birita: *(rópar)* Niels, kom nú niður, vit eta um eina løtu! *(Niels reisir seg tvørur. Lýsir rundan um seg)*

Niels: *(sigur við seg sjálvan)* Nú kann tað vera nóg mikið. Tað er kanska tað bera tvætl við hesum vættrunum. *(Niels krýpur niður av loftinum og letur lemmin aftur. Tað verður næstan myrkt aftur).*

2. partur

TJALDIÐ *(Framvegis myrkt á loftinum. Úr stovuni hoyrist jólatónleikur. Lemmurin fer upp, og høvdið á Nielsi kemur undan. Hann hevur lummalyktina í hondini).*

Niels: *(rópar niður til Biritu)* Nei, her eru heldur ongar nú. Eg síggi tær, ið hvussu so er, ikki.

Birita: *(Úr stovuni)* So kann tað gera tað sama. Nú er jólaaftan, eru tær ikki komnar nú, so koma tær als ikki.

Niels: Jamen, skulu vit ikki seta eitt sindur av greyti fyri vættrarnar? Eg meini... koma tær, so er synd, at tær einki fáa at eta, er tað ikki?

Birita: Alt í lagi, ger tað so, mamma hevur gjørt okkurt gott, hóast hon kanska flennir at okkum. *(Niels letur lemmin aftur, og tað verður næstan myrkt. Málið í honum hoyrist)*

Niels: Eg fari kortini eftir onkrum... kanska onkur kemur. *(Ein hálvur minuttur gongur, har pallurin er næstan myrkur. Niels kemur krúpandi upp gjøgnum stigan við einum stórum fati. Hann hevur lummalyktina í aðrari hondini)*

Niels: *(Tosar við seg sjálvan)* Soleiðis... *(setir fatið frá sær)* so er matur til vættrarnar. *(Hann setir seg á kuffertið og hyggur rundan um seg eina løtu)* Vættrar... *(Hann reisir seg og sigur ilsliga)* Nú kann tað vera nóg mikið, nú fari eg niður í stovuna at halda jólaaftan! *(Hann letur lemmin aftur og fer niður. Tað er stilt eina løtu, so sæst eitt livandi ljós, og ein vættur kemur gangandi við einum kertiljósi í hondini, sum hon setir á gólvið. Hon hyggur kannandi rundan um seg, varnast fatið við greytinum, og rópar)*

1. vættur: Hygg her er matur, kom og síggj! *(7 aðrar vættrar koma inn á pallin hvør við sínum kertiljósi. Tær seta ljósini frá sær í ein rund-ing)*

2. vættur: *(ein eldri vættur við skeggi)* Ja, eg hugsaði tað altíð, at tey fóru at seta greyt til okkara jólaaftan.

3. vættur: Ja, heilt vís í tí kundi tú ikki verða, vit hoyrdu sjálvar, at børnini høvdu mist mótið.

4. vættur: *(heldur um búkin og flennir)* ha, ha, ha, hugsið tykkum, at tey smáu hildu, at fult var av vættrum, tá ið tey komu upp á loftið.

5. vættur: *(ein eldri vættramamma)* Á, sum nútíðarbørn eru barnslig, tey hugsa seg ikki væl um.

8. vættur: Eg veit ikki rættuliga, hvat eg skal siga um hatta. Eru ikki nógvar vættrar til beint nú.

7. vættur: Jamen, tað var gott, at børnini ikki mistu mótið. Mær hevði ikki dámt at verið her og einki fingið at etið.

8. vættur: Tú kundi ivaleyst tolað at hildið jólaaftan matleys, sum tú plagar.

6. vættur: Álvaratos, hon hevði tolað at svøltað líka til næstu jól.

1. vættur: Høvdu vit ongan mat, noyddust vit at sitið og hugt at rottum...

6. vættur: Lat vera at tosa um rottur, tað fer mær kalt niður eftir bakinum, tá ið tosað verður um rottur. Helst minnast tit tað, sum er skrivað í okkara jólasangi í ár.

1. vættur: Jú, men...

6. vættur: Lat nú vera. *(Tekur eina greytaskeið og sleikir hana)* Sum hasin greyturin smakkar væl. Tað er langt síðan, eg havi smakkað nakað so gott! *(Vættrarnar eta í ein minutt. Tær smaska og turka sær upp í ermuna)*

3. vættur: Táið tit eru lidnar at stappa í tykkum, roynið og sitið stillar eina løtu. Tey syngja so vakurt niðri í stovuni! *(Hon fer yvir at lemminum og letur hann upp, so tað hoyrist betur. Týðuliga hoyrist sálmurin »Fagur himin er at sjá«)*

7. vættur: Sum hasin sálmurin er vakur, eg verði ongantíð móð av at hoyra hann.

5. vættur: *(við fullum munni)* Tig nú, eg hoyri ikki tað, tey syngja! *(Vættrarnar sita stillar og lurta, til sálmurin er liðugur)*

3. vættur: *(Letur lemmin aftur)* Vit mugu ansa eftir, at tey ikki hoyra okkum, tá ið tey eru liðug at syngja!

2. vættur: *(Hyggur at lummaurinum, sum hon hevur drigið upp úr lummanum)* Kæru vinir, hava tit sæð, hvat klokkan er. Eg haldi, jólamaðurin verður her hvørja løtu.

1. vættur: Tvætl, hann kemur ikki enn á sinni, hugsa um allastaðni hann skal jólaaftan!

4. vættur: Um nú Niels og Birita koma og lata lemmin upp... Eg meini... Tey vænta jú eisini jólamannin.

6. vættur: Tvætl, tey koma ikki... og koma tey, so hoyra vit tey.

1. vættur: *(flennir)* So sníkja vit okkum avstað!

8. vættur: Eg hoyri okurt... Sssh, hvat var hatta?

5. vættur: *(bangin)* Hatta var ikki ein rotta, ha?

3. vættur: Áh, tín býttlingur, sjálvandi var hatta ikki ein rotta, eg haldi, tað er jólamaðurin, hann er tíðliga á veg í ár.

7. vættur: *(sløkkir ljósið)* Latum okkum kløkka hann. Komið og goymið okkum aftan fyri kuffertið. *(Allar vættrarnar skunda sær aftur um kuffertið, og har royna tær at goyma seg. Jólamaðurin kemur inn á pallin og hevur eina gamla lampu í hondini. Við kertiljósi)*

Jólamað.: Sig mær, eru ongar vættrar her? *(Gnisan hoyrist aftan fyri kuffertið)*

Jólamað.: *(setur posan frá sær)* Tað var keðiligt, og eg, sum hevði glett meg til at sæð vættrarnar. *(Setur seg á posan og hyggur rundan um seg. Enn hoyrist gnisan aftan fyri kuffertið)* So má eg bara goyma tey serligu jólabommini, sum eg hevði hugsað mær, at vættrarnar skuldu fingið. *(Tesk hoyrist aftan fyri kuffertið. Jólamaðurin reisist aftur)*

Jólamað.: Áh, her er fult av rottum, tað hoyrist undan hasum kuffertinum. *(Hann fer yvir til kuffertið, lyftir tað harðliga uppfrá. Vættrarnar leypa flennandi upp)*

2. vættur: Hevur tú nøkur bomm jólamaðurin?

Jólamað.: Hatta hoyrdu tit? *(Tekur ein posa og gevur vættrunum hvør sítt)*

4. vættur: *(sýgur og smaksar)* sum hatta smakkar væl!

7. vættur: Tað smakkar næstan líka væl sum rísgreyturin!

Jólamað.: Hví krógvaðu tit tykkum vættrar? Var tað bara, tí tit ætlaðu at arga meg?

2. vættur: Vit bíðaðu eftir tær, jólamaðurin, men vit sløktu ljósið, tí vit skuldu kløkka teg, tað kundi eisini verið Niels ella Birita, og tey skulu helst ikki síggja okkum.

Jólamað.: Tað ger kanska einki, um tey síggja tykkum, tvørturímóti.

2. vættur: Júmen, jólamaðurin, tú hevur sjálvur sagt, at...

Jólamað.: Sovorðið tvætl, jólaaftan kunnu børnini síggja tykkum!

5. vættur: Ná, so kunnu vit bara rópa á tey. *(ætlar at reisa seg)*

Jólamað.: *(ristir við høvdinum)* Nú fari eg oman til teirra við gávunum, sum eg havi í posanum. *(hevur ein posa í aðrari hondini)*

7. vættur: Júmen, hvussu so við okkum?

Jólamað.: Ja, vit koma kanska upp á loftið aftaná at heilsa upp á tykkum.

8. vættur: Eisini foreldrini... koma tey eisini?

Jólamað.: Ja, eisini foreldrini... meðan tit bíða, kunnu tit venja til ársins jólasang. *(Jólamaðurin tekur posan við sær, men letur lampuna standa mitt á gólvinum. Hann letur lemmin upp. Aftur hoyrist spakuligur jólatónleikur. Stilt er eina løtu, so sigur 4. vættur)*

4. vættur: Hoyrdu tit ikki, hvat jólamaðurin segði? Hann segði, at vit skuldu venja til ársins jólasong.

2. vættur: Eg veit, at eg dugi hann ikki allan.

3. vættur: Sjálvandi dugir tú hann ikki, tú hevur ikki lært hann, soleiðis sum vit í Vættralandi hava lært hann.

5. vættur: *(Tekur eitt pappír úr lummanum)* Her havi eg sangin. Eru tit til reiðar?

Øll: *(Lag: Á hoyggjhúslofti....)*
Á hoyggjhúslofti har býr jólamaðurin
og húski hans og húski hans

1. vættur: Hann murrar, og hann smílist, og hann sýpur greyt.

Øll: Og gevur ikki øðrum ans.
(Allar vættrarnar flenna.... 2. vættur heldur um búkin og er um at skrædna av látri)

6. vættur: Hoyr nú... skulu vit bara tvætla ella syngja sangin lidnan?

Øll: Vit skulu syngja sangin lidnan.

1. vættur: Men rotturnar hoyra, og tær renna.

Øll: Og flenna, og tær munga, so fara tær at dansa og sjunga: »Vit vilja hava jólagreyt«

3. vættur: Sig mær nú eitt... tit eru farnar at halda jól av álvara.

4. vættur: Jú, jólini eru her. Kunnu vit krevja meira, jólamaðurin er komin, og úti kavar... *(verður avbrotin)*

8. vættur: Kavar longu?

6. vættur: Satt er tað, eg var yviri við vindeygað í áðni, og eg sá tær vøkru flykrurnar á rútinum.

3. vættur: Skulu vit ikki fara at syngja aftur. Halda tit ikki, at vit skulu syngja sama jólasálm sum í fjør.

Øll: Føgur er foldin
dýrdarríkur himin
sæl er sálanna jorsalferð
um allan heimin
um allar ævir
tað syngjandi at himni ber.

Øldirnar fara
øldir munnu koma
ætt eftir ætt søkkur undir mold.
Ongantíð tagnar
ljóðið av himni
sum gleðir sálir her á fold.

Einglar tað kvóðu
jólanátt for hirðum
mann eftir mann hoyrdist sama lag:
Friður á foldum
menniskja frø teg
tær føddur frelsari er í dag.

5. vættur: Skulu vit ikki fara at smakka jólagreytin, sum er settur her til okkara? *(Øll rópa av gleði, triðja vættur tekur greytarfatið, og allar taka skeiðina úr lummanum og fara at fáa sær)*

4. vættur: Sum tað smakkar væl.

3. vættur: *(flennir, peikar á 4. vættur)* Tú hevur koyrt niður, tín grísur. *(Øll flenna og eru nøgd)*

1. vættur: Vit verða móðar av at eta og syngja — — — Skulu vit ikki fara at hvíla okkum eina løtu, meðan vit bíða eftir jólamanninum.

6. vættur: Sig mær eitt, kanst tú ikki bara sova alt samdøgrið?

1. vættur: Eg haldi, tað er eitt gott hugskot, so kunnu vit droyma um Vættraland. Eg haldi, tað kavar har.

7. vættur: Tig nú, eg verði sjúk av at hoyra teg, eg gleði meg so nógv til í morgin, tá ið vit aftur fara heim til Vættralands.

1. vættur: Skulu vit sova ella ikki?

3. vættur: *(geispar)* Eg veit ikki... ah *(leggur seg. Vættrarnar leggja seg, tær geispa)*

6. vættur: Sum tit eru dølskar... *(leggur seg. Skjótt hoyrast vættrarnar snorka. Løtu seinni fer lemmurin upp, og jólamaðurin hyggur inn á loftið. Málið í Biritu hoyrist úr stovuni)*

Birita: Lat meg síggja, lat meg síggja.

Jólamað.: Ja, her er nakað at síggja barn mítt, men soleiðis er tað hvønn jólaaftan, altíð sova tær smáu vættrarnar, tá ið eg komi aftur. *(Høvdið á Nielsi kemur undan)*

Niels: *(Ógvuliga glaður)* Ja men... Tað er so, vættrarnar liggja her og sova. Sum her eru nógvar. *(Jólamaðurin og Niels krúpa upp á loftið, og Birita kemur aftaná)*

Birita: Nei, sum tær eru fittar, skulu vit ikki vekja tær?

Jólamað.: Nei, lat tær bara sova, tær skulu eina langa ferð í morgin, so tær mugu sleppa at sova. Eg má fara, gleðilig jól. *(Jólamaðurin fer, men vendir sær á, áðrenn hann fer av pallinum).* Eg haldi, at tit skulu biðja foreldrini koma higar. Tey vilja fegin síggja rættiligar vættrar ha ha. *(fer)*

Birita: Nei, sum tær eru fittar.

Niels: Eg visti tað altíð, tær hava verið her alla tíðina. Tað er heilt vist.

Birita: Veitst tú hvat, eg rópi mammu og pápa, tey skulu eisini síggja tær. *(Birita fer yvir at lemminum, setur seg at húka og rópar niður)*

Birita: Mamma, pápi, komið higar og síggið! *(pápin og mamman hoyrast niðriundir)*

Pápi: Hvat bagir Birita?

Birita: Tit skulu síggja vættrarnar, komið nú. *(Pápi og mamma krúpa upp á loftið og standa sum kánus, tá ið tey koma upp á loftið)*

Mamman: *(slær hendurnar saman ovurfegin)* Her eru vættrar!

Niels: Ja, hvat søgdu vit? *(blunkar erpin til Biritu)*

Pápin: *(flennir)* Sum tær eru fittar, lat tær bara sova í frið, kann vera, at tær verða bangnar, tá ið tær síggja fýra fólk standa og hyggja at sær.

Mamman: Eg haldi, at pápi hevur rætt, latum okkum sníkja okkum niður. *(tey krúpa niður av loftinum. Birita er seinast. Hon steðgar eina løtu, so bara høvdið kemur undan)*

Birita: *(við seg sjálva)* Sum vættrarnar eru fittar. Á sum eg gleði meg til næstu jól. *(Birita letur lemmin aftur)*

4. vættur: *(setur seg varliga uppundir seg, narrar eyguni)* Droymdi eg, eg má hava droymt. *(Hyggur gjølla rundan um seg)* Nei, her er eingin, eg má hava droymt *(hyggur at hinum vættrunum, sum enn liggja og sova)* Á, tær sova við fullari ferð. Eg haldi, eg leggi meg bara aftur. *(Hon rættir seg eftir lyktini, letur lemmin upp, so ljósið sleppur upp, og beint áðrenn hon blæsur á ljósið sigur hon)*

4. vættur: Gleðilig jól øll somul *(Úr stovuni hoyrist sálmurin »Gleðilig jól«)*

TJALDIÐ